Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Landsdverk og frágreiðingin frá SWECO um trygdina í Suðuroyartunlinum

Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin givið Landsverki boð um ella loyvi til at bíleggja frágreiðingina frá SWECO?
2. Visti landsstýrismaðurin av, at Landsverk var farið aktivt inn á annað málsøki?
3. Nær bleiv frágreiðingin bíløgd?
4. Nær fingu løgmaður og P/F Suðuroyartunnilin avrit av frágreiðingini?
5. Hvat kostaði frágreiðingin frá SWECO, og hvør hevur góðkent rokningina?

Viðmerkingar:

Síðst í september kom fram, at ráðgevarafyritøkan SWECO hevur skrivað eina frágreiðing um trygdina í Suðuroyartunlinum.
Løgmaður hevur frá byrjan havt ábyrgdina av Suðuroyartunlinum. Ikki Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið og tískil ei heldur Landsverk. Tað bleiv sligið fast, tá hendan samgongan tók við.
Allíkavæl hevur Landsverk blandað seg í viðgerðina av málinum við at sáa iva um tað arbeiðið, sum verður gjørt av øðrum myndugleika. Landsverk hevur hesa ferð sett seg í samband við ráðgevarafyritøku, sum ikki hevur royndir við tunlum í Føroyum, ella teimum størru tunlunum í Noregi, og sum er beinleiðis kappingarneyti hjá norsku ráðgevarafyritøkuni Norconsult, sum hevur gjørt arbeiði fyri P/F Suðuroyartunnilin.
Frágreiðingin sigst vera bíløgd fyri góðum ári síðan, men fyrst nú sær hon dagsins ljós.
Tað hevur almennan áhuga, hvat avvarðandi landsstýrismaður av Landsverki visti og heldur um, at Landsverk er farið inn á annað málsøki, og harvið brúkt almennan pening til eina frágreiðing, sum tað er ivasamt, um stovnurin hevur heimild til.

Á Løgtingi, 2. oktober 2024

Bjarni Hammer